Undirvísingartilfar
At ferðast á netinum

# Orð hava vald

*Grundspurningur:*

**Hvat skalt tú gera, tá onkur nýtir ljótan ella óunniligan málburð á internetinum?**

# Orð hava vald – Inngangur

Hetta heftið er nummar fýra í røðini av teimum seks tættunum til undirvísingartilfarið *At ferðast á netinum* og er til tín sum lærari, ið vil undirvísa og vegleiða næmingum at ferðast trygt á netinum.

At reika á netinum er ein natúrligur partur av gerandisdegnum hjá flest øllum, bæði børnum og vaksnum. Hetta setur krøv til skilagóðan atburð, og hvussu vit tryggja okkara privatlív, og hetta er nakað sum tú, sum lærari, kann hjálpa við.

Ein væl tilrættisløgd undirvísingargongd í ymiskum lærugreinum, har næmingurin fer í dýpdina saman við sínum floksfeløgum tryggjar, at evnið verður tikið í álvara og fær neyðuga viðgerð.

Somuleiðis er sera umráðandi, at foreldrini hava ein virknan leiklut. Fyri hvørt evni er ein heimasetningur, har foreldrini og barnið í felag viðgera ymiskar spurningar, ið stinga seg upp í kjalarvørrinum av kunningartøknini.

Ein slík skipað tilgongd er – saman við foreldrafundum og øðrum átøkum í SSP – við til at menta okkara børn og ungu til at gerast skilagóðir og vandaligir brúkarar, tá ið teir reika á netinum og brúka mongu pallarnir og samskiftishættirnar har.



















**Ábyrgd:** SSP-ráðgevingin.
**Útgivið:** 2017/2022.
**Málbólkur:** Miðdeild 4.-6. flokkur.
**Lærugrein:** Føroyskt.
**Umbrotið, prentað og heft:** Føroyaprent.
**Samband:** Um tú sum lærari, foreldur ella fakfólk hevur spurningar ella tørv á vegleiðing til tilfarið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum.

SSP-ráðgevingin
R. C. Effersøesgøta 26
FO-100 Tórshavn
Tel. 30 24 80

# Undirvísingargongd

| | |
|---|---|
| Skúlaár | |
| Skúli | |
| Floksheiti | |
| Floksstig | Miðdeild – 4.-6. flokkur. |
| Lærugrein | Føroyskt. |
| Lærari | |

| | |
|---|---|
| Heiti | At ferðast á netinum – Orð hava vald. |

| | |
|---|---|
| Førleikamál | **Støðisførleikar**<br>At virða<br>• At virka fyri góðari samveru millum menniskju. Virðing fremur tryggleika og trivnað, ið eru fortreytir fyri gagnligari menning.<br>At samskifta<br>• At bera fram hugsanir sínar munnliga og at lesa og skriva.<br>• Førleika at bera fram hugsanir sínar munnliga.<br>• Venja seg við at skifta orð, lýða á og bera fram egnar metingar.<br>**Fakligir førleikar**<br>Talaða málið<br>• At lurta og spyrja um tað, ið sagt verður frá.<br>• At fata samskifti í mun til boðbera, móttakara, miðil og støðu.<br>Skrivaða málið<br>• at svara skrivligum spurningum ella á annan hátt vísa, at tað lisna er skilt.<br>• at finna høvuðsinnihald í tekstum.<br>• at gera skrivligar viðmerkingar til tað, hann hevur hoyrt ella lisið.<br>• at skriva orð og styttri setningar við skilligari handskrift.<br>• at nýta fjølbroytt orðatilfeingi.<br>Samansettir tekstir<br>• At tosa um endamálið við samansettum tekstum. |
| Tímatal | Undirvísingartímar í alt uml. 20.<br>Til evnið *Orð hava vald*, skulu nýtast 1-2 dupulttímar í føroyskum. |
| Undirvsingarmiðlar | Tilfar, sum er gjørt til hetta undirvísingarevni, næmingaskjøl og heimasetningur. |
| Arbeiðshættir | Floksundirvísing, bólkaarbeiði, framløgur, kjak og rørsluvirksemi. |

| | |
|---|---|
| Eftirmeting (sendast til SSP-ráðgevingina eftir útfylling). | Í hvønn mun eydnaðist undirvísingargongdin? |
| | Var tímatalið hóskandi? |
| | Var tilfarið hóskandi? |
| | Í hvønn mun rukku næmingarnir settum førleikamálunum? |
| | Hvussu eydnaðust ymsu arbeiðshættirnir? |
| | Uppskot til broytingar |

## Grundspurningur:

Hvat skalt tú gera, tá onkur nýtir ljótan ella óunniligan málburð á internetinum?

## Samandráttur:

Meðan børn eru á teirra yndisheimasíðum ella á teimum sosialu miðlunum, kunnu tey fáa keðilig boð frá øðrum brúkarum, sum gera tey kedd, ill, særa tey ella bangin. Vit kanna hesa ferð, hvat vit kunnu gera við happing á netinum, og hvat er til ráða at taka, tá málburðurin er ørkymlandi. Hvat er happing á netinum, og hvussu kann slík happing handfarast?

Næmingarnir tosa um hættir at nýta tøkni til samskifti, umframt at tey sleppa at seta seg í stað teirra, ið eru fyri happing á netinum. Eisini koma vit inn á munir og líkskapir, tá tað snýr seg um samskifti andlit til andlits og á netinum. At enda hugleiða næmingar um, hvussu best er at svara til happing á netinum.

## Lærusetningur:

- Næmingar læra at liva seg inn í kenslur teirra, ið fáa særandi boð.
- Næmingar læra at døma um, hvar markið er millum vanligt og vandafult samskifti á netinum.
- Næmingar læra at fi na loysnir til happing á netinum.

## Fyrireiking

- Skriva út *Næmingaskjal 1* „Orð kunnu særa“ (síða 8) og *Næmingaskjal 2* „Snapchat-søgan“ (síða 9).
- Litblýantar.
- Eitt band/snór, ið er sum skúlastovan til longdar.
- Skriva út *Heimasetningur* (síða 10), sum børnini fáa heim við til foreldrini.

### *Upphiting: 5 minuttir*

Tekna hesi andlit á talvuna: 🙂 😍 🙃 😶 😖

Bið næmingarnar seta orð á kenslurnar á teim ymsu andlitunum – og tú fært allarhelst ymisk svar.

🙂 **Glað, samd, nøgd...**
(Hetta andlitið kann eisini hava eitt niðurgerandi ella ironiskt ljóð, t.d. tá onkur skrivar “tað er í lagi,” men meinar tað øvuta).

😍 **Elski, tilbiði, glað, takksom...**

🙃 **Tvætli, ironisk, sarkastisk, fjákut...**

😶 **Málleys, tigi, eyðmjúk, skuffað, frustrerað...**

😖 **Ill, vaml, kedd, irriterað...**

Greið næmingunum frá, at ikki øll tulka eina støðu eins og tí er lætt at misskilja hvønn annan gjøgnum skíggjan. Av somu orsøk er tað týdningarmikið at teir hugsa seg um, áðrenn teir senda eini boð og andlit til onnur.

*Uppgáva 1: 15 minuttir*

# Hvat er trupulleikin?

Næmingarnir skulu vera í bólkum við 4 næmingum, og hvør bólkur velur ein skrivara, sum skrivar teirra hugskot niður.

Gev teimum *Næmingaskjal 1* „Orð kunnu særa" (síða 8). Lat næmingarnar lesa søguna um Rana og Arinu, sum fáa ljót boð á Fortnite, har tey vanliga spæla.

Allir bólkarnir skulu svara spurningunum, og síðan deila teir svarini við flokkin. Lat næmingarnar svara einum spurningi í senn og tak síðani samanum fyri hvønn spurning. Greið næmingunum frá, at Rani og Arina helst eru blivin kedd, tí boðini eru órein og særandi, og at tey tí skulu steðgast. Fólk senda tílík boð av ymsum orsøkum, men tað er týdningarmikið at minnast, at oftast kann orsøkin sporast aftur til felagsskapin hjá teimum sum hava sent boðini, tí hann er undir trýsti (les síðu 5 í undirvísingartilfarinum „Happing á netinum"). Orsøkin til, at vit siga at orð hava vald er, at børn og ung ofta ikki hugsa um, hvussu mótparturin tekur ímóti boðnum, áðrenn tey senda tað avstað og tískil ikki umhugsa avleiðingarnar. Líka sum jalig orð kunnu hava nógv at siga, so hava neilig orð eisini nógv at siga. Lat so næmingarnar lesa "Sig frá" niðast á síðu 9.

Nú kunnu næmingar deila sínar søgur, um teir hava upplivað nakað líknandi.

## Spyr:

Hava tit fingið ljót boð, ella hava tit sæð ljót boð, ið eru send øðrum á netinum? Sig okkum frá, men ikki brúka nøvnini á teimum, sum tað snýr seg um.

Lat næmingar vera saman tveir og tveir.

Lat annan næmingin skriva „Tú ert løgin" á eitt pappír, sum hann gevur hinum. Sig teimum, at tey júst hava fingið hesi boð á netinum.

## Spyr:

Hví halda tit, at nakar man senda eini tílík boð?

## Dømi:

- Hetta er framhald av einum spæli, tey hava sínámillum.
- Tann, ið fekk boðini, gjørdi okkurt løgið áðrenn.
- Ein bólkur av børnum argar hetta barnið.
- Sendarin heldur, at móttakarin er løgin, men torir ikki at siga tað andlit til andlits.

## Spyr:

Hvussu man móttakarin hava tað, tá onkur kallar hann/hana løgnan?

Lat annan næmingin smílandi siga við hin: „Tú ert løgin".

## Spyr:

Hví er tað øðrvísi at siga okkurt andlit til andlits, heldur enn á netinum?

## Svar:

Tí tú sært, hvussu fólk meina tað, tey siga. Smílið sigur, at tað er ikki illa meint.

Tosið aftur um týdningin av „Emojis", og hvussu man skal hugsa seg um, áðrenn man sendir tey."

*Uppgáva 2: 10 minuttir*

# Virðislinja

Legg bandið á gólvið, og být soleiðis skúlastovuna í helvt. Bið næmingarnar standa øðrumegin bandið. Bið teir ímynda sær, at teir eru á netinum, og at onkur hevur sent teimum eini boð, sum tú nú fert at lesa fyri teimum. Um næmingarnir halda, at hesi boð eru í lagi, skulu teir verða standandi, men um boðini fara um teirra mørk, skulu teir taka eitt fet yvir um bandið. Eisini kunnu teir standa á band-inum, um teir halda, at boðini kunnu vera bæði.

Les hesi boð hart, og lat næmingarnar siga, hví teir standa har, sum teir gera:

- Tú ert ein idiot.
- Eg havi eina veitslu, og tú ert ikki boðin.
- Mær dámar títt hár.
- Tú ert mega ljót/ljótur.
- Takk fyri boðini. Kanska tú vilt siga mær hetta andlit til andlits næstu ferð?
- Ert tú liðug/liðugur við tíni skúlating?
- Tú ert superløgin.

Sig næmingunum, at børnum dámar at vera á netinum, at nýta fartelefonir til at senda sms, nýta snapchat, messenger og annað, og at teimum dámar at hyggja at video á Youtube, at spæla spøl og at gera skúlating. Tó er tað onkuntíð so, at málnýtslan á netinum gerst órein ella ræðandi. Boð, sum gera fólk kedd ella bangin fara um markið. Onkuntíð er tað ikki tilætlað, men tá fólk nýta netið ella fartelefonina til við vilja at gera onnur kedd aftur og aftur, so er tað happing á netinum.

*Uppgáva 3: 15 minuttir*

# Tosa og far til verka

Lat næmingarnar seta seg aftur.
Tosið um, hvussu lætt tað er at gerast kedd ella ill, tá onkur sendir tær keðilig boð á netinum ella við fartelefonini.

**Greið frá**, hvat happing á netinum er (frágreiðing er at finna á síðu 5 í fimta undirvísingartilfarinum „Happing á netinum"). Greið frá, at happing á netinum er júst líka álvarsamt sum happing andlit til andlits og skal steðgast beinanvegin. Tosið um hesi hugskotini, hvat tú kanst gera, um tú verður happað/ur á netinum:

- At taka tað róligt er eitt gott hugskot, tá tú fært eini ljót boð á netinum. At byrja við kann man fáa hug at svara skjótt aftur í illsinni, men tá kann man vera í vanda fyri at ósemjan veksur. Anda djúpt, tel upp í 10 ella steðga á og hugsa um, hvat tú nú skalt gera. Hetta gevur tær tíð til at finna besta hátt at viðgera støðuna.
- Eitt, tú kanst gera, er at leita tær hjálp hjá einum vaksnum ella hjá einum góðum vini, sum tú hevur álit á. Tú eigur ikki at handfara happing á netinum einsamøll/einsamallur. Tann, sum tú sigur tað fyri, skal vera ein, sum hevur hug at lurta eftir tær og kann hjálpa tær at finna eina loysn. Ofta eru vaksin serliga góð, tí tey hava ábyrgd av at gera nakað við støðuna, ella geva tær ráð um, hvat tú kanst gera.
- Sama hvat tú gert, so skalt tú minnast til at goyma happandi boðini. Um tú strikar boðini, er einki prógv fyri, at hesin persónur hevur happað teg, og prógv eru góð at hava, um tú skalt leita tær hjálp.

Lat tey tekna eina happingarstøðu og eina møguliga loysn.

## *Samanumtøka: 5 minuttir*

Tú kanst nýta hesar spurningar til at vita, hvussu væl næmingarnir hava skilt boðskapin og tikið hann til sín.

**Spyr:**
Hví er tað ikki eitt gott hugskot at senda órein ella ræðandi boð á netinum ella við fartelefonini?
- Tí tað ger móttakaran keddan, illan ella bangnan.

**Spyr:**
Hví misskilja fólk lættari hvønn annan, um boð verða send á netinum, enn um tey verða søgd andlit til andlits?
- Tí einki kropsmál er at siga okkum, hvussu boðini skulu skiljast, og tí gera vit okkara egnu uppfatan av, hvat sendarin man halda og meina.

**Spyr:**
Hvat skulu næmingar gera, um teir fáa happandi boð á netinum?
- Teir kunnu:
  - Taka tað róligt og anda djúpt.
  (Spyr: hvat kann henda um man ikki tekur tað róligt? Svar: man kann blíva illur, svara ljótt aftur og soleiðis kann ósemjan blíva við at vaksa).
  - Siga tað við ein vin ella ein vaksnan, tey líta á, sum kann hjálpa teimum.
  (Spyr: hvør kundi tað verið? Greið frá, at ofta kann tað verða torført at siga tað við ein vaksnan og tí kann man siga tað við ein vin at byrja við og sum so kann hjálpa við at siga tað við ein vaksnan. Bið teir geva ítøkilig dømi um hvørji vaksin teir kundi sagt tað við.)
  - Lata sum einki.
  (Spyr: Hvat kann henda um man letur sum einki? Svar: tað er ongantíð ein haldgóð loysn at lata sum einki, tí tað steðgar sjáldan happingini. Tað er umráðandi at siga tað við ein vin ella vaksnan, so man ikki situr einsamallur við tí.
  - Goyma boðini.
  (Spyr: hvussu goymir man eini boð? Svar: við t.d. at taka eina skíggjamynd. Vís fegin næmingarnar, hvussu man ger).

*Næmingaskjal 1*

# Orð kunnu særa

Les søguna og svara síðan spurningunum.

Spælari 1: Eg hati teg!
Spælari 2: Tú oyðileggur spælið!
Spælari 3: Tú ert so býtt!
Spælari 4: Tú ert klikkaður!

Rani og Arina dáma væl at spæla spøl sum Fortnite, har tey eisini kunnu kjatta við onnur børn. Foreldur teirra hava givið teimum loyvi til at spæla og kjatta í spælinum. Í seinastuni hava Rani og Arina fingið órein boð í spælinum. Her eru nøkur dømi:

1. Hvussu heldur tú Rani og Arina hava tað, tá tey lesa hesi boð?

2. Hvussu hevði tú havt tað, um tað vart tú, sum fekk tílík boð?

3. Hví heldur tú, at fólk senda slík boð til fólk, sum tey ikki kenna?

4. Hví heldur tú, at vit siga, at orð hava vald?

*Næmingaskjal 2*

# Snapchat-søgan

Elsa fær eini boð á Snapchat frá vini sínum Rasmus. Í boðunum stendur: „Eg fari at halda eina veitslu, og tú sleppur ikki við“. Set ring um ta kenslu, sum Elsa man hava, tá hon fær boðini.

1. Kedd.
2. Glað.
3. Væl dámd.

Tróndur stuttleikar sær við at spæla Roblox. So fær hann eini boð frá einum øðrum spælara. Har stendur: „Tú oyðileggur spælið, idiot!“ Hvat skal Tróndur gera við boðini? Hvat skal hann ikki gera? Fyll út talvuna niðanfyri við at seta bókstavin fyri ymsu útsagnirnar í teigin, har tú heldur, at teir skulu vera.

Tróndur skal:

a. Skriva eini boð aftur, sum siga „Tú ert so býttur, TÚ oyðileggur spælið!“
b. Lata sum um hann ikki verður keddur av boðunum
d. Goyma boðini, um nú spælarin sendir fleiri tílík boð
e. Siga einum vaksnum frá um boðini
f. Gevast at spæla á netinum

| Tróndur skal | Tróndur skal ikki |
|---|---|
| | |

Lærarasvar: Tróndur skal : D, E || Tróndur skal ikki : A, B, F

*Næmingaskjal 3*

# Happing við orðum

## Hetta skalt tú gera:

Ger eina teknirøð um eina støðu við happing á netinum. Myndirnar skulu lýsa hvør sín part av støðuni.

**Mynd 1:** Ger eina tekning av onkrum, sum ein happari á netinum kundi gjørt ella skrivað.

**Mynd 2:** Vís hvat tú hevði gjørt, um tú sást, hvat happarin gjørdi ella skrivaði.

**Mynd 3:** Hvussu kann hetta enda væl?

## Sig frá

- Tað kann vera sera trupult, tá onkur skrivar særandi boð til tín á netinum. Um onkur er óreinur við teg á netinum steðga so á, goym boðini og sig tað við ein vaksnan (Bið møguliga læraran vísa, hvussu man tekur skíggjamynd).
- Um tú, ella onkur tú kennir, verður happaður á netinum, tosa so við ein vaksnan, sum tú hevur álit á. Tað kann vera foreldrini, onkur í familjuni, flokslærarin, SSP-lærarin ella heilsufrøðingurin á skúlanum. Um hetta er ov trupult, sig tað so við ein vin. So kann hann hjálpa tær at siga tað víðari við ein vaksnan og saman kunnu tit finna útav, hvat næsta stigið skal vera.

# Heimasetningur

*– saman við foreldrum/vaksnum*

# Orð hava vald

Tá ljótur málburður verður nýttur á netinum, verða vit kedd, og kunnu vera kedd leingi, tí keðiligu boðini, sum vit fingu í dag, kunnu vit síggja aftur í morgin og um ein mánað – tey vera verandi.

Tí er umráðandi, at vit hugsa okkum væl um, áðrenn vit skriva til onnur fólk – eisini, um boðini bert eru meint sum skemt.

### *Heimauppgáva 1:*

Hvat skulu vit gera, um vit fáa eini ljót boð á netinum? Vel rætta svarið:

1. Svara aftur við eins ljótum boðum.
2. Ongantíð fara á netið aftur.
3. Ikki svara, goyma boðini og siga frá.

### *Heimauppgáva 2:*

Tosið um, hvat tað merkir, tá vit siga, at orð hava vald.

### *Heimauppgáva 3:*

Setið saman, so tað hóskar:

| | |
|---|---|
| **Talgildur borgari** | Kunning, sum ikki kann nýtast til at siga skipanum á netinum, hvør tú ert. T.d. aldur, kyn, hvussu nógv systkin tú hevur, tín yndismatur osv. |
| **Persónlig kunning** | Ein, ið er partur av heimsumfatandi samfelagnum, sum nýtir internetið. |
| **Privat kunning** | Ein, ið stjelur privata kunning frá fólki, og síðan letur sum um hann/hon er hetta fólk. |
| **Samleikatjóvur** | Kunning, sum kann nýtast til at siga skipanum á netinum hvør tú ert. T.d. P-tal, bústaður, teldubústaður, telefonnummar. |

Rætta svar til **heimauppgávu 1:** 3. Ikki svara, goyma boðini og siga frá. Tað er ongantíð ein haldgóð loysn at svara aftur við eins ljótum orðum, tí so hækkar man ósemjuna. At byrja við kann man hugsa, at besta loysnin er ongantíð at fara á netið aftur, men tað loysir ikki trupulleikan.
Rætta svar til **heimauppgávu 3:** Ein talgildur borgari er ein, ið er partur av heimsumfatandi samfelagnum, sum nýtir internetið.
Persónlig kunning er kunning, sum ikki kann nýtast til at siga skipanum á netinum, hvør tú ert. T.d. aldur, kyn, hvussu nógv systkin tú hevur, tín yndismatur o.s.fr. Privat kunning er kunning, sum kann nýtast til at siga skipanum á netinum, hvør tú ert. T.d. P-tal, bústaður, teldubústaður, telefonnummar o.s.fr. Samleikatjóvur er ein, ið stjelur privata kunning frá fólki, og síðan letur sum hann/hon er hetta fólk.

Skúli
Sosialir myndugleikar
Politi

PRENT: FØROYAPRENT | SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705